## Eingin havísur um fimm ár

Í hesum døgum halda umleið 150 altjóða veðurlagsgranskarar ráðstevnu í Grønlandi, og nakrir teirra siga nú, at um fimm ár ella so verður eingin havísur kring Grønland um summarið. Ein av granskarunum, René Forsberg, sigur við danska kringvarpið, at sambært einum amerikonskum granskara verður havið kring Grønland ísfrítt í 2015. Aðrir siga 2035 ella 2040, men tað avgerandi er sjálv niðurstøðan, at havísurin kring Grønland hvørvur, sigur René Forsberg við DR. Sjálvur er hann heldur ikki í iva um, at havísurin fer at minka nógv tey næstu árini.



## Kunnu roykja marihuana

Fyri nøkrum døgum síðani góvu myndugleikarnir í Meksiko fólki loyvi til at hava rúsevnini kokain og heroin, hevur hægstirættur í Argentina staðfest, at argentinar hava loyvi til at eiga og at roykja rúsevnið marihuana. Í úrskurðinum sigur rætturin, at tað er ikki í stríð við argentinsku grundlógina, at fólk eiga og roykja marihuana. Í Meksiko var talan um meina politiska avgerð at loyva fólki at hava kokain og heroin, og broytingin skal geva løgregluni betri tíð til stríðið ímóti teimum máttmiklu rúsevnaharkaliðunum.

## Vestmanna vil læna meira

**Vestmanna kommuna hevur søkt Fíggjarmálaráðið um loyvi at taka lán og fara upp um eina skattaálíkning fyri at byggja røktarheim**

KOMMUNUMÁL
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Upprunaliga var ætlanin, at Vestmanna kommuna og Kvívíkar kommuna í felag skuldu byggja røktarheim í Vestmanna. Men tá ið Kvívíkar kommuna leyp frá, kom stígur í.

Vestmanna kommuna hevur tó ikki slept ætlanini um at fáa eitt røktarheim í bygdini.

Kommunan heldur seg til sjálv at byggja heimið, sum skal kunna rúma 20 fólkum.

Men slík bygging kostar nógvan pening. Metingin sigur 20 mió. krónur.

21. juli sendi Vestmanna kommuna Fíggjarmálaráðnum umsókn um loyvi at taka lán, tí lántøka hevur við sær, at kommunuskuldin fer upp um eina álíkning.

Svar er ikki komið aftur enn.

Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna vónar, at kommunan fær loyvi at taka lán. Hann er sannførdur um, at kommunan er før fyri at røkja sínar skyldur við fleiri lánum, tí støðugt arbeiði er í kommununi.

# Allar á sjúkrahúsið

**Eingin av teimum trimum gentunum, sum skaddar vóru í einum ferðsluóhappi í Byrgisbrekkuni í Søldarfirði týskvøldið, sat í trygdarbelti**

*Myndir: Anthon Hoygaard*



FERÐSLUÓHAPP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Klokkan var farin av hálvgum tíggju týskvøldið, tá ið eitt álvarsligt ferðsluóhapp hendi í Byrgisbrekkuni í Søldarfirði.

Tveir bilar koyrdu niðan móti Lambareiði, og tá ið tann fremri skuldi snara til vinstru inn á ein blindan veg, rendi hin aftari bilurin inn í síðuna á tí bilinum, tí ætlanin var at yvirhála. Ferðin var ikki nógv, tí bilarnir vóru júst komnir úr bygdum øki.

Í tí aftara bilinum vóru tríggjar ungar gentur, 18, 17 og 16 ára gamlar.

Bilførarin í aftara bilinum varnaðist ikki, at hin bilurin blinkaði til vinstru, og hon rendi inn í vinstru síðu á tí bilinum, og bilurin fór niðan av vegnum og rendi inn í helluna omanfyri.

### Allar skaddar

Tær tríggjar genturnar fingu allar skaða og vórðu fluttar á Landssjúkrahúsið. Men áðrenn tað kom sløkkiliðið og skar eina av gentunum leysa.

Bilførarin fekk skaða í knæið og sár , og hon hevði ilt í øllum kroppinum. Hon, sum sat undir liðini á henni, fekk ilt í nakkan og lærið. Gentan á baksetrinum fekk skeinu í pannuna og í kjálkan.

Genturnar eru oast alt komnar væl frá óhappinum. Tvær sluppu heim í morgun, meðan tann triðja skal kannast eitt sindur nærri, upplýsir politiið í Runavík.

Sambært politinum sat eingin av gentunum í trygdarbelti, og politiið sigur eisini, at skaðin hevði verið nógv minni, høvdu tær verið íbundnar.

Tvey fólk vóru í hinum bilinum. Tey fingu einki mein.



# Krøvini fyri Olshanu-uppruddingina slept

**Av ótta fyri at fáa endurgjaldskrav frá reiðarínum hjá russiska trolaranum Olshana, sum sakk við Flesjarnar fyri góðum tveimum árum síðan, hevur landsstýrið gjørt av at taka aftur rokningina móti reiðarínum fyri uppruddingina**

OLSHANA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Endaligt punktum er nú helst sett við hendingina, tá ið russiski trolarin Olshana sakk við Flesjarnar í august 2007. Fyri langari tíð síðan varð avgjørt, at eingin kanning skal gerast, og nú hevur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum fingið undirtøku frá landsstýrinum um, at einki krav skal setast móti reiðarínum fyri tær átta milliónirnar, sum tað kostaði at rudda upp og í tilbúgving.

Landsstýrið sendi annars beinanvegin eina rokning áljóðandi fimm milliónir til russiska reiðaríið Zamphorflot, sum átti Olshanu.

### Best at tiga

Men seinni vendi Innlendismálaráðið sær til Advokatskrivstovuna og bað um eitt tilmæli, og tað tilmæli var, at tók landsstýrið ikki rokningina aftur, var mest sannlíkt, at reiðaríið fór at koma við mótkravi fyri missin av skipinum.

Reiðaríið hevur alla tíðina sagt, at tað var burturvið at skræða skipið av skerinum, har tað stóð, í staðin fyri at tøma tað fyri olju og bíða eftir flóðini.

Annika Olsen og starvsfelagi hennara Jacob Vestergaard vóru samd um, at klókast var at sleppa kravinum, og hini landsstýrisfólkini vóru samd.

- Vit halda tunguna mitt í munninumí fyrsta umfari, men kemur reiaríið við kravi fyri missin av skipinum, senda vit rokningina, sigur Annika Olsen.

Árni Dam í Faroe Agency, sum var umboðsmaður hjá russiska reiðarínum, væntar ikki, at reiðaríið kemur við rokning. Málið er liðugt, heldur hann.

### Strangari enn ES

Men hendingin hevur havt ein annan prís. Eingir av teimum russisku trolarunum, sum fiska kongafisk, koma longur til Føroya.

- Men tað kemur eisini av, at tað er so trupult hjá russiskum skipum at koma til Føroya at landa, og tí fara tey aðrastaðni. Eg veit ikki, hvussu tað ber til, men Føroyar ganga nógv strangari eftir eftir ES-reglunum, enn nakað ES-land ger, sigur Árni Dam.